# Føroyska fiskivinnan kemur í stórar trupulleikar um fá ár

*–Okkurt má gerast, og tað má vera nú. Tí samstundis sum útreiðslurnar hjá skipunum eru nógv hækkaðar, verða møguleikarnir at fiska alsamt skerdir*

Áki Bertholdsen

– Verður onki gjørt nú, kemur Føroyska fiskivinnan í stórar trupulleikar um fá ár.

Hetta er boðskapurin frá Føroya Reiðarafelag eftir aðalfundin um vikuskiftið.

Reiðarafelagið sigur, at yvirhøvur ganga øll tølini fyri fiskiflotan tann skeiva vegin í løtuni.

Yvirhøvur er fiskiskapurin versnaður, og tað ber bara takkað verið teimum sera høgu prísunum, at avreiðingarvirðið er á nøkunlunda sama støði, sum í fjør.

–Men hinvegin mugu vit staðfesta, at møguleikarnir at fiska verða meiri og meiri skerdir, samstundis sum útreiðslurnar hækkað. Tí fer tað at verða trupult at fáa raksturin at bera seg, sigur Reiðarafelagið.

### Í stórar trupulleikar

Felagið vísir á ta sannroynd, at fiskiskapurin eftir ísfiski undir Føroyum er reguleraður við fiskidøgum.

– Men tað er eisini ein sannroynd, at nú mangla bæði partrolarir og línuskip fiskidagar.

– Samstundis hevur fiskimálaráðharrin boðað frá, at dagatalið verður skert 10% frá 1. september í ár

– Verður hetta gjørt, koma hesir skipabólkar í stórar trupuleikar.

Reiðarafelagið vísir eisini á, at hetta seinasta árið eru oljuprísirnir tvífaldaðir

–Hetta er ógvuliga tyngjandi fyri raksturin hjá trolaraflotanum, og tá serstakliga hjá lemmatrolarunum, tvs, hjá djúpvatnstrolarunum, rækjutrolarunum, svartkjaftatrolarunumr, flakatrolarunum, umframt hjá nótaskipunum, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum.

– Hetta saman við minkandi veiðimøguleikum fer at gera tað trupult at fáa raksturin at bera seg.

– Tað verður tí ikki møguligt at skapa møguleikar fyri nýggjum íløgum, ella til nakra endurnýgging av flotanum, tí hann kastar ikki nóg nógv av sær til at hann megnar at endurnýggja seg, burtusæð frá einstøkum skipum, sigur reiðarafelagsformaðurin.



*– Vit biða ikki um studning, men tað má verða hvørjum manni greitt, at tey næstu árini verður tað tørvur á stórum íløgum til nýggj skip. Og tær íløgurnar megnar flotin ikki at gera einsamallur, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum*

### Okkurt má gerast nú

Reiðarafelagið sigur, at einstakir politikarar fegnast um, at tað hevur eydnast at fáa allan studning til fiskivinnuna burtur, men samstundis bara veksur og veksur tann almenna nýtslan.

– Fiskivinnan biður ikki um studning, men tað má verða hvørjum manni greitt, at tað verður tørvur á stórum íløgum til nýggj skip.

– Tað er ikki nøktandi at okkara fiskimenn skulu sigla við 30-40 ára gomlum skipum.

–Samstundis er væntandi, at fiskivinnan kemur í harða kapping um fólkið, eitt nú við oljuvinnuna. Fólkið fer sjálvsagt har, umstøðurnar eru bestar og tað er so skjótt, at fiskivinnan kann koma at liggja eftir á, um umstøðurnar ikki batna.

– Jákup Sólstein sigur, at um ikki ein ætlan verður gjørd nú, har tað almenna hjálpir til at fáa eina langtíðarætlan upp at standa, so kemur føroyska fiskivinnan í stórar trupulleikar um fá ár.

Jákup Sólstein leggur afturat, at hetta er einki annað enn turr staðfesting.

Men, hvussu hetta skal gerast, hevur hann ikki gjørt sær nakrar tanka um.

– Nógvir tankar hava verið frammi um, hvussu hetta kundi verðið gjørt. Men politiskt eru teir allir skúgvaðir av borðinum. Sostatt er neyðugt við nýggjum, politiskum tankum fyri at finna eina loysn.

Og Jákup Sólstein heldur at tað hevur skund, tí tað ganga nógv ár frá tí, at teir fyrstu tankarnir eru farnir at spíra, til verulig gongd er komin á endurnýggingina.

### Møguleikarnir skerdir

Felagið vísir á, at møguleikarnir á fjarleiðum verða eisini skerdir í framtíðini.

– Á Flemish Cap verður helst kvota sett á rækjurnar um heilt stutta tíð, og tá kunnu vit ikki vænta at fáa meir enn eini 6 - 7.000 tons.

– Eisini hevur ES boðað frá, at felagsskapurin vil endurskoða sáttmálan við Føroyar.

Men hetta verður ikki til okkara fyrimun - heldur tvørtur ímóti, tí teir fiska bert ein lítlan part av tí, teir kunnu fiska hjá okkum.

Her kann rækjuveiðan við Eysturgrønland koma í vanda, sigur Reiðarafelagið.

Felagið sigur eisini, at svartkjaftastovnurin skal býtast ímillum londini, og hetta kemur at fáa stóra ávirkan á okkara møguleikar at fáa fiskirættindi aðrastaðni - t.d. Íslandi, Noregi, Russlandi og ES.

– Makrelurin er nú býttur ímillum strandalondini, og okkara partur er 30.000 tons. Heildarkvotan fyri 2000 er á einum høgum støði, so tað kann væntast, at henda veiðan kemur at minka í framtíðini.

– Um heildarkvotan av sild fera at minka, so verður okkara partur eisini tilsvarandi minni.

– Toskastovnurin í Barentshavinum er illa fyri sambært fiskifrøðingum, og hetta sæst eisini á fiskiskapinum.

Kvoturnar koma tí eisini her at lækka munandi komandi árini.

Reiðarafelagið ásannar tí, at tað samanumtikið ikki sær so gott út fyri møguleikunum at fiska í framtíðini. Tí er at vóna, at fiskaprísirnir fara at halda sær á einum høgum støði, og at oljuprísirnir fara at lækka munandi, tí annars verður ikki væl vorið hjá stórum parti av føroysku fiskiskipunum, sigur Reiðarafelagið.

–Tá ið prísirnir eru so høgir, sum teir eru, skal lítið til, áðrenn teir verða fyri bakkasti, leggur Jákup Sólstein afturat og tað kann verða álvarsligt.

### Afturvaldir

Annars hendi ongin broyting í nevndini hjá Reiðarafelagnum á aðalfundinum um vikuskiftið.

Tveir nevndarlimir stóðu fyri valið. Tað vóru teir báðir tvøramenninir, Gudmund Mortensen og Viberg Sørensen, og teir vórðu báðir afturvaldir.

Hinir nevndarlimirnir eru Eiler Jacobsen og Poul Hansen í Havn, Jónsvein Knudsen í Saltangará, Ólavur Petersen í Sørvági, umframt Jákup Sólstein, sum er formaður.

Tiltakslimir eru Eyðálvur Joensen, Johan Christiansen, Tummas Mortensen, Bogi Mortensen og Jákup Egholm Hansen

## Sundaberg er á veg heim

Nú er flakatrolarin Sundaberg á veg heim til Føroya. Hann hevur roynt í norskum sjógvi. Men har bleiv tann føroyska kvotan uppi í gjár og tí hevur Sundaberg gjørt av at sigla heim.

Fiskiskapurin hevur ikki verið tann stóri. Sundaberg fór heiman í frá 1. apríl og hann hevur eini 240 tons av flaki í lastini, nú hann siglur heim. Men er nøgdin ikki stór, er prísurin hinvegin sera góður, tí Sundaberg fær yvir 40 krónur fyri kilo, so teir fáa útvið 10 milliónir fyri lastina

*–Áki-*

## Fáa 15-16 krónur fyri kilo

Fyribils eru tvey føroysk skip farin í Irmingarhavið at royna eftir Kongafiski har.

Tey eru Enniberg og Akraberg.

Enniberg fór mánadagin, men Akraberg hevur gjørt ein túr- og hann var góður.

Túrurin var nakað langur, tí tað hevur viðrað nakað illa, men hann hevði 380 tons, nú hann fór inn at avreiða. Hann fór til Reykjavíkar at avreiða og har var prísurin heilt góður, tí Akraberg fekk 15-16 krónur fyri kilo av skráskornum kongafiski.

*–Áki–*

## Fekk 420 tons av svartkalva

Ljósafellið hevur verið á Flemish Cap og fiska Svartkalva og tað hevur gingið heilt væl.

So vítt, vit hava fingið uppspurt, fór hann yvir fyrst í mars mánaða og nú hevur hann fingið uppí.

Sostatt hevur hann 420 tons í lastini. Og tað fær hann heilt væl fyri, tí eisini prísurin á svartkalva er stak góður, einar 25 krónur fyri kilo, so teir fáa yvir 10 milliónir fyri lastina.

*–Áki–*



# Nú hava politikarar frítt spæl

*Henning Jacobsen, fyrrverandi stjóri á Landsverkfrøðingsstovninum, fekk ikki starvið aftur. Hann avvísir ikki, at hann var millum umsøkjararnar, men sigur samstundis, at hann hevði ikki væntað at fingið starvið. Nú tykist, sum er frítt hjá politikarum at blaka embætisfólk út, er ein av niðurstøðum hansara*



Dagfinn Olsen

Nú er greitt, at starvið sum landsverkfrøðingur er sett og at hann eitur ikki Henning Jacobsen.

Sostatt kann Henning Jacobsen nú endaliga staðfesta, at hann er fyrrverandi landsverkfrøðingur, sum hann eisini hevur verið tað, síðani hann varð loystur úr starvinum av Finnboga Arge, landsstýrismanni. Hetta hendi, tá ætlanir vóru um at leggja saman Landsverkfrøðingsstovnin og Strandferðsluna.

### Væntaði sær ikki starvið

Henning Jacobsen avvísir ikki, at hann var millum teir 7, ið søktu starvið sum landsverkfrøðingur. Men hann sigur eisini, at hann hevði ikki væntað at fingið starvið.

Henning váttar, at hetta sigur hann útfrá teirri sannføring, at tað er trupult hjá einum politikara at draga í land og ásanna mistøk, tí hetta í politiska heiminum er tekin um veikleika. Sjálvur ivast Henning Jacobsen í, um hetta er rætt.

### Persónspurningur

*Ert tú samdur í tí, at um landsstýrismaðurin setti teg aftur í starv, so hevði tað verið tað, ið verður rópt falitterklæring ella vesalaváttan?*

– Hon hendi jú beinanvegin. Tveir stovnar skuldu leggjast saman, men hetta var eftir øllum at døma ikki hugsað ígjøgnum, so har tapti landsstýrismaðurin beinanvegin uttan størri hóvasták. Hetta hendi innanfyri teir fyrstu 14 dagarnar. Restin var bert ein persónspurningur, og tað haldi eg er ikki so áhugavert at koma nærri inn á, heldur Henning Jacobsen.

### Niðurstøðan

Henning Jacobsen er komin til ta niðurstøðu, at nú hava politikarar frítt spæl.

– Tað er trupult at koma til eina niðurstøðu, men ein hevur hildið, at tænastumenn vóru nakað fast, ið skapti stabilitet. Ryggurin í umsitingini. Nakað, ið var loyalt, og flutti seg neyðugt, í mun til politisku samansetingina. Men eftir hetta letur til, at ein uttan hokus pokus kann blaka tænastumenn út, uttan at tænastuverðin sigur frá, so at tað merkist, sigur Henning Jacobsen.

– Niðurstøðan hjá verandi og komandi landsstýrismonnum má vera, at teir hava frítt at fara. Eingin hóttir teir. Dámar teimum ikki ein, so er bara at blaka út, staðfestir Henning Jacobsen.

### Tað er ikki bara

Spurdur um, hvørt landsstýrismaðurin við setanini av nýggjum landsverkfrøðingi, hevur valt best umsøkjaran, sigur Henning Jacobsen, at talan er um ein mann, ið vónandi fer at rigga í starvinum, men sum í samanhanginum er óroyndur.

– Hóast væntandi royndir, kann ein vera dugnaligur. Men vit hava jú mong dømi seinnu árini, har roynt verður fyrst við einum stjóra, so tí næsta og so framvegis. Tað er jú ikki givið, at ein rakar rætt. Tí tað er jú ikki bara bara , tí tað eru mangir smálutir í slíkum starvi, sigur Henning Jacobsen, sum leggur afturat, at tað vísir seg ikki, fyrr enn ein tíð er fráliðin, hvat hepnaðist og hvat ikki hepnaðist og metingarnar um hetta kunnu vera ójavnar.

### Staðið sum klettur

– Landsverkfrøðingsstovnurin hevur altíð staðið sum ein klettur, sum ikki lat seg rista, um landsstýrismenn skiftu og ringar tíðir vóru. Har var einki bøvl í fjølmiðlum og landsstýrismenn komu ikki í neyð av stovninum, sigur Henning Jacobsen.

- Um hetta verður øðrvísi í framtíðini, torir hann ikki at meta um, men hann staðfestir, at nógv er at hoyra um aðrar stovnar.

– Ein hoyrir í hvussu er nógv frá øðrum stovnum, har ein ikki kann siga tveimum fólkum upp, uttan at landsstýrismaður kemur í neyð.

- Tað sigur so mikið, sum at týðiligir munir eru. Í einum stað verður farið fram, sum ein má og skal til tíðir, meðan aðrastaðni verður bólturin bert blakaður aftur í politisku skipanina. Um tað broytist, velst um mentan og verimáta. Tað kann eisini vera, at politikarum dámar betri, at eitt sindur av rumbli er um teir, tí so koma teir oftari í fjølmiðlarnar. Spies segði, at øll reklama er góð, positiv og negativ, og kanska er nakað um tað. Júst hví ein landsstýrismaður hevur verið nevndur hvønn dag í fjølmiðlunum, hava fólk gloymt eftir 4 árum, heldur Henning Jacobsen.

### Betri við umboðsmanni

Greiða niðurstøðan hjá Henningi Jacobsen er, at nú er frítt hjá politikarum at blaka embætismenn til hús, uttan at nakar sigur orð ella eið.

Men hinvegin fegnast hann um, at kanska støðan hesum viðvíkjandi fer at broytast, tá vit fáa løgtingsins umboðsmann.

– Eingin skipan er, ið tekur slíkt upp. Men nú fáa vit løgtingsins umboðsmann. Kanska fer tað at gera mun. Men sum er, finst eingin skipan, ið t.d. kann hjálpa privatfólki og ein kann ikki rokna við, at tey fara at føra sak í áravís mótvegis landsins myndugleikum, heldur Henning Jacobsen.

Hann heldur, at, slík skipan helst kann verða hent, tí so kunnu fólk leggja sína søk fyri óheftan persón ella stovn, sum kann fara víðari við hesum.

– Tá skulu fólk bert geva eina frágreiðing og ikki føra eina sak í rættinum, sigur Henning Jacobsen, sum í dag arbeiðir hjá SEV.

*– Niðurstøðan hjá verandi og komandi landsstýrismonnum má vera, at teir hava frítt at fara. Eingin hóttir teir. Dámar teimum ikki ein, so er bara at blaka út, staðfestir Henning Jacobsen, fyrrverandi landsverkfrøðingur*

» – Landsverkfrøðingsstovnurin hevur altíð staðið sum ein klettur, sum ikki lat seg rista, um landsstýrismenn skiftu og ringar tíðir vóru. Har var einki bøvl í fjølmiðlum og landsstýrismenn komu ikki í neyð av stovninum «

## Nýggjur stjóri fyri landsverkfrøðingsstovnin

*Nýggjur landsverkfrøðingur er Oyvindur Brimnes*

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Finnbogi Arge, setti mánadagin Oyvind Brimnes í starv sum stjóra fyri landsverkfrøðingsstovnin. Fyribils setti stjórin, Hans Biskopstøð, fer nú frá vegna aldur.

Oyvindur Brimnes er 36 ára gamal og útbúgvin sivilverkfrøðingur. Hann hevur arbeiðsroyndir úr Føroyum og Grønlandi, bæði viðvíkjandi fyrisitingarligum og praktiskum arbeiði. Hann starvast í løtuni hjá Tórshavnar Havn, har hann stendur fyri útbyggingum og viðlíkahaldi.

Oyvindur Brimnes tekur við starvinum tann 1. august í ár, sigur Vinnumálastýrið í tíðindaskrivi.

*- do -*


## KAPPING UM BÚMERKI

Føroya Handverksmeistarafelag fer í næstum at seta á stovn ein sjálvsstøðugan grunn, iðfær navnið **Valahandverk.**
Endamálið við grunninum er at tryggja, at handverk altíð verður væl úr hondum greitt, eins og endamálið er at geva brúkarunum ein kærumøguleika, um teir ikki eru nøgdir við arbeiðið, ið er gjørt av einum limi.

**1. Innbjóðing**
Lýst verður við hesum til kapping um búmerki til Grunnin. Búmerkið skal nýtast í øllum samskifti, vit fara at hava í sambandi við grunnin. Tað skal vera einfalt og eyðkent á høgum grafiskum stigi. Búmerki skal viðvíkja tí, ið grunnurin fer at takast við.

**2. Luttøka**
Kappingin er opin. Øll, ið halda seg hava eitt hóskandi uppskot, kunnu luttaka í kappingini.

**3. Virðisløn**
Virðislønin fyri valda uppskotið er 10.000 kr.

**4. Dómsnevnd**
Nevndin í Føroya Handverksmeistarafelag verður dómsnevnd.

**5. Innlating**
Uppskot skulu latast inn í A4 stødd og vera í tveimum, annað svart og hvítt og hitt í liti ella í litum. Uppskotini skulu vera dulnevnd við frámerki. Saman við uppskotinum skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan og við navnaseðli í, sum sigur, hvør ið uppskotið hevur gjørt.

**6. Tíðarfreist**
Uppskot skulu vera Føroya Handverksmeistarafelag í hendi í seinasta lagi 8. juni 2000 kl. 16.00, merkt "Búmerki".

***Føroya Handverksmeistarafelag***
***Postsmoga 179***
***R.C. Effersøesgøta 30***
***110 Tórshavn***

***Tlf. 311864 Fax 317278***
***e-mail:*** fag@industry.fo

Føroya Handverksmeistarafelag tilskilar sær rætt til ikki at velja nakað av innkomnu uppskotunum.

Sosialurin - 311820